LM-099/2023

Fylgiskjal 70

Hoyringssvar til uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu 2024

Í Gásadali hava vit naka av ognarjørð, sum vit royna at umsita so burðardygt sum til ber.

Vit hava eisini eina matstovu hvar vit borreiða við okkara seyðakjøti, tarvkálvakjøti, eplum og ørum sum vit framleiða. Vit hava eisini gott samstarv við ferðaleiðarir og ferðasmiðjir, og framtíðar vónirnar eru nokso bjartar.

Í skrivandi stund hava vit fólk á drúgvum skeiði sum búnaðargrunnurin og VFI hava sett í gongd. Endamáli við skeinum er byggja brýr ímillum landbúna og freðavinnu. vit hava lagt okkum eftir at gera skipaðar túrar við ferðaleiðara, tí tað eru for nógv óskipa ferðafólk í Gásadali.

Treytin fyri okkara virksemi skal rigga er, at vit kunna troyta okkara lendi á besta hátt, og sjálvi seta avmarkingar um neyðugt. Ít nakrir fáðir føroyingar ganga á okkara ognarjørð, er IKKI nakar trupuleiki.

Um øll onnur ferðafólk blíva javnsett við føroyingar at ganga frítt fyri nakrar hundrakrónuselar, so missa vit alt tamarhaldi. Tað fer at órógva okkara seyðahald, neytahald og grundarlagi fyri okkara virksemi verður hótt fíggjarliga.

Tí vilja vit harliga mótmala uppskotinum hjá Høgna um burardygga ferðavinnu, og tað er serliga okkara avmarkingar í ræðisrættinum á okkara lendi sum er ræðandi.

32-02-2024
b.h. Jóhann Fagraklett

Nevndarformaður á Gásadalsgarði